FNU:Hoyring fíggjarnevndin 14. januar 2021
Vegna FNU: Jón Kragesteen og Gunnar Restorff

Vit eru her vegna FNU, Føroya Náttúru og Umhvørvisfelag og tað skuldi ikki verið neyðugt at greitt meira frá endamálinum hjá felagnum, tað liggur í heitinum.

Eg havi lurtað eftir orðaskiftinum, sum tit, saman við restini av tingmanningini, høvdu í desember. Samanumtikið haldi eg, at nógv góð sjónarmið vóru løgd fram. Sum uttanfyristandandi áhoyrari legði eg til merkis, at fokusið var nokk so nógv á tey ymisku átøkini í sjálvum sær og ikki so nógv um, hví tað er neyðugt at gera átøkini.

So, tað vil eg í stuttum koma inn á:
Jørðin er í ferð við at hitna og veðurlagið kring heimin er í ferð við at broytast. 2020 var heitasta árið, sum nakrantíð er mált. Men útlit eru tik at tað verður eitt tað kaldasta árið komandi 10 árini, so hvørt sum jørðin heldur áfram við at hitna. Og soleiðis fer at vera, um vit ikki steðga gongdini.

Tað er lætt at staðfest, at ísurin í polarøkjunum minkar skjótt. Jøklarnir kring heimin bráðna. Vit hava ongar jøklar her, men tey, sum onkuntíð eru á skíðferð í Noregi ella í alpunum hava uttan iva fingið við, at skiðstøðini seinastu 30-40 árini hava verið noydd at fara longu og longur upp í fjøllini fyri at fáa kava - ella oftari at gera kunstigan kava.
.
Av tí at heimsins jøklar bráðna, sigur tað seg sjálvt, at havið hækkar. Sambært okkara fremsta havgranskara Boga Hansen, er vatnskorpan við Føroyar hækkað knappar 10 cm seinastu 25 árini og útlitini eru at hetta fer at ganga skjótari framyvir.

At havið hækkar fer at ávirka stór landaøki í heiminum, har milliardir av fólki búgva, tey noyðast at flyta til onnur støð at búgva.

Tá ið jøklarnir eru turrir, turka eisini áir, sum í øldir hava veitt fólki vatn.
Øktur hiti og nógv væta eru bestu gróðrarlíkini fyri ódnum tí kunnu vit vænta fleiri av teimum í framtíðini.

Broyttu liviumstøðurnar elva til fólkaflytingar og tær fara at vera stórar. Tað er kent í søguni, at fólkaflytingar skapa ótryggleika og ófrið.

Eg ivist onga løtu í, at tit hava hoyrt hetta fyrr.

Men eg valdi at taka hetta fram, tí at í orðaskiftinum var nakrar ferðir settur spurningur við***, hví vit skulu vera so grøn*** - og róð varð uppundir, at hetta bara var fyri ***at vera politiskt korrektur.*** Við øðrum orðum eitt úttrykk fyri ikki at hava skilt hvat málið veruliga er um.

Men NEI, tað er ikki fyri at vera politiskt korrektur. Veruleikin er, at vit eru í einari umhvørviskreppu og vit mugu gera okkurt fyri at steðga henni.

Hvat kunnu vit so gera? hvat kunnu lítlu Føroyar gera?

Vit skulu sjálvandi taka okkara part.

Sum er, er okkara CO2 útlát millum tey hægstu í heiminum, yvir 21 tons pr. fólk. Hetta er einar tríggjar ferðir meira enn tað, sum er í hinum norðurlondunum, sum er uml. 7 tons. Danmark hevur sum mál at minka niður í helvt í 2030. Um vit skulu røkka sama máli, skal okkara CO2 útlát niður í 1/6.

(Og vit kunnu ikki umbera okkum, at vit hava serlig viðurskifti vegna okkara fiskiflota. Tí á hinari síðuni er CO2 útlátið av øllum tí, sum vit innflyta ikki roknað upp í okkara útlát)

Vit skulu tí fáa ferð á at sleppa okkum undan oljuni, vit skulu framleiða meira grøna orku og vit skulu skifta yvir til el allastaðni í samfelagnum.

Millum góð átøk eru:

- at skifta bensin/diesel bilar út við elbilar
  (Føroyar eru seriliga væl egnaðar til elbilar)

- skifta oljufýrar út við hitaskipanum av ymiskum slag

At skifta til nýtt/ókent (til elbilar/hitaskipanir) er ikki bara-bara. Átøk mugu til fyrstu tíðina.

Samanumtikið

- Norska SUCCEIN er fyrimynd
- Leingja mvg frítøku fyri el-bilar 3-5 ár (síðani minka í stigum)
- Ikki mvg-frítøka til HYBRID
- Ikki mvg-frítøka til PLUG-IN (um - so munandi minni)
- Leingja mvg-frítøku til hitapumpur o.l.
- Veita mvg-frítøku til smáverk: sólarorku, vatnverk o.l
- **Taka SÚKKLUR upp í, bæði EL og Vanligar**

Báðir greiddu frá góðu royndunum at hava elbil ávikavist í í 3½ og 2½ ár

Jón Kragesteen, jonkragesteen@gmail.com, 510449